## Illveður í Íslandi



Tað hevur viðrar sera illa í Íslandi í seinastuni við nógvum vindi og kavaroki. Leygardagin var so nógvur vindur á Reykjavíkarleiðini, at vindmátarnir komu upp á einar 50 metrar um sekundið, og løgreglan ráddi fólki frá at fara út. Umleið 300 mans vóru til arbeiðis hjá bjargingartænastuni í høvuðsstaðarøkinum. Á Vestfirðum vóru fleiri skalvalop, og á flogvøllinum í Keflavík snaraði ein hvirla einum stórum flogfarið tvær ferðir.

## Botndjór tola lítið

Kanningar hjá norska granskaranum Gro Harlaug Olsen tykjast benda á, at oljudálking hevur munandi størri ávirkan á djór, sum liva á botni í arktiskum sjóøki enn á djór, sum liva á botni í eitt nú Oslofjørðinum. Hinvegin tola tey arktisku botndjórasløgini meiri, áðrenn tey doyggja. Gro Harlaug Olsen sigur við Nordlys, at ætla oljufeløgini sær at vinna olju í arktiskum sjóøki, mugu tey hava í huga, at dálking ávirkar vistfrøðina meiri har enn aðrastaðni.

# Tveir eldar um vikuskiftið

**Í einum annars friðarligum vikuskifti mátti løgregla og sløkkilið tvær ferðir út at sløkkja eldar. Í báðum førum var tó bert talan um smávegis skaðar**

ELDUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Sunnukvøldið um hálvgum seks-tíðina fekk løgreglan fráboðan um eld í einum kamari í Pedda við Steinsgøtu.

Bert ein persónur var í kamarinum, og hann var sloppin út, tá løgreglan kom á staðið. Maðurin var somikið skelkaður og í øðrviti, at løgreglan mátti fáa hann út á sjúkrahúsið at viðgerast fyri roykeitran og snudd í andlitinum.



*Eldurin í einum kamari í Pedda við Steinsgøtu gjørdist ikki so umfatandi, men maðurin, sum leigar kamarið var roykeitraður og í øðrviti, umframt at hann hevði fngið ein snudd í andlitið*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

Hildið verður, at eldurin byrjaði í seingini hjá manninum, men tað kann kortini ikki sigast við vissu enn. Tað eydnaðist tó skjótt at fáa bilbukt við eldinum, og skaðin var eisini avmarkaður.

Aftur tíðliga í morgun varð boðað frá eldi. Tað var um hálvgum fimm-tíðina, at ein ung kvinna boðaði frá eldi í einum sjónvarpi.

Hon hevði havt tvey fýrfatsljós standandi á sjónvarpinum, og var sovnað frá teimum við tí úrsliti, at tey brendu niður gjøgnum sjónvarpið og festi í. Unga kvinnan megnaði í fyrsta umfati at sløkkja eldin sjálv, men longu tveir minuttir seinni boðaðu løgreglumenn á staðnum frá, at fest var í aftur. Men tá var sløkkiliðið á veg, og tað bleiv so bara sjónvarpið, sum fórst, umframt eitt sindur av roykskaða.

Unga kvinnan, sum var einsamøll inni í íbúðini uppi í Berjabrekku, varð síðani koyrd út á landssjúkrahúsið til eygleiðingar fyri roykeitran.

Burtursæð frá hesum báðum tilburðunum, hevði løgreglan lítið og einki at gera hetta vikuskiftið.

# Ungdómsting í løgtinginum

**Í dag og í morgin er ungdómsting í løgtinginum við luttøku av seks skúlum. Ungdómstingið skal viðgera ellivu uppskot, sum øll verða beind til nevndarviðgerð**

UNGDÓMSTING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað var við eitt sindur broyttari manning, at Hergeir Nielsen setti tingfundin klokkan tíggju í morgun. Talan er nevniliga um eitt ungdómsting, nakað, sum hevur verið roynt áður við góðum úrsliti.

Tingformaðurin nevndi ítøkiliga dømi um, at løgtingið samtykti eina lóg sum bannar fólki at sláa børn, og hetta var júst viðgjørt á ungdómstinginum.

Í morgun var fyrsta málið á skránni avtøka av mvg'inum á frukt. Hetta sum ein liður í at fáa fólk at eta sunnari, og víst var eisini á, at peningurin, sum avtøkan av mvg fór at kosta landinum, í ríkiligt mát verður vunnin inn aftur í færri sjúkradøgum.

Teir seks skúlarnir, sum taka lut í ungdómstinginum, umboða Sørvágs skúla, skúlan á Ziskatrøð, Argja skúla (tveir flokkar), Eystrskúlan og Venjingarskúlan.

Luttakandi flokkarnir hava útarbeitt ellivu ítøkilig uppskot, og hesi fáa øll fyrstu viðgerð í dag, har tey verða beind í viðkomandi nevndirnar. Síðani fer ein nevndarviðgerð fram seinnapartin í dag, og síðani koma tey til endaliga viðgerð fyrrapartin í morgin.



*Tey sleppa at royna seg sum løgtingslimir í dag og í morgin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Seinnapartin í morgin verður so høvi hjá ungdómstinglimunum at seta fram munnligar spurningar til løgmann og landsstýrisfólkini.

Alt fer fram sum á einum vanligum tingfundi, og starvsfólkið í løgtinginum er til reiðar at hjálpa ungdómstinglimunum á sama hátt sum tey gera tinglimunum.

Ungdómstingið endear við almennari móttøku klokkan fimtan í morgin.